# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ

Sosialurin 8. oktober 2009




## Víkingurin er óttaleysur

**Andreas Lava Olsen stúrir ikki fyri at møta fronsku heimsstjørnunum á útivølli. – Tú skalt ikki ræðast teir, tí teir vinna milliónir av krónum fyri at spæla bólt, sigur hann**





Rólant Waag Dam


Trégoier, Frankaríki: Andreas Lava Olsen hevur spælt tríggjar landsdystir og hevur skotið eitt mál higartil. Góð hagtøl at vísa á hjá leirvíkinginum, sum hevur tikið ta ábyrgd, tað er at umboða sítt land, óttaleysur.

– Bara tí, at teir vinna milliónir av krónum fyri at spæla fótbólt, so skalt tú ikki ræðast teir, ljóðar svarið frá Andreas Lava Olsen, tá hann verður spurdur, um tað ikki verður heilt øðrvísi at skula spæla í móti fronsku heimsstjørnunum á útivølli, enn tað var á Tórsvølli í summar.

### Vil enda árið ordiligt

Heldur ikki tann sannroynd, at teir flestu í føroyska hópinum júst eru lidnir við eitt drúgt kappingarár við mongum og tøttum dystum, er nakað, ið kemur illa við hjá føroyska liðnum, metir Andreas Lava Olsen.

– Sjálvandi hevur tað verið strævið, men nú skulu vit enda árið ordiligt, heldur enn at hugsað um troyttu beinini, sigur hann.

Júst tí kom venjingin í gjárkvøldið eisini væl við. – Tað var bara fyri at loysa upp og fáa beinini í gongd, so tað var super, sigur leirvikingur, sum spælir fótbólt í Gøtu.



# Havi saknað hetta

**Rógvi Jacobsen hevur verið burtur frá landsliðshópinum í meiri enn eitt ár. Nú skal hann stríðast fyri at fáa plássið aftur og prógva sítt virði fyri Brian Kerr. Tað gleðir hann seg til**





Rólant Waag Dam


**Trégoier, Frankaríki:** Eftir stuttu venjingina í gjárkvøldið, vóru menn rættiliga skjótir at busta gaggurnar reinar, fáa sær ein vatnsopa og so gekk leiðin oman í bussin, sum bíðaði eftir teimum.

Øðrvísi var tó við toppskjúttanum á føroyska landsliðnum. Rógvi Jacobsen, ið ikki hevur verið partur av landsliðnum í meiri enn eitt ár orsaka av skaða, brúkti rættiliga langa tíð um at strekkja út.

Klaksvíkingurin ger alt fyri at sleppa undan skaðum – og ræðist eisini at verða skaddur aftur beinanvegin – men gleðin um at vera við aftur á landsliðnum er tað, sum fyllir mest hjá Rógva Jacobsen.

Hetta kennist gott! Eg havi verið burturfrá í so langa tíð nú, at eg havi longst eftir hesum, greiðir Rógvi Jacobsen frá.

Spakuliga seinastu tíðina hevur hann arbeitt seg aftur á vøllin. Men tað sá svart út í eina tíð.

– Fyri tveimum mánaðum síðani, tá eg ikki fekk spælt, hevði eg als ikki roknað við hesum. Tí kennist tað eyka gott at vera við aftur, sigur Rógvi Jacobsen.

### Tekur ongar kjansir

Gleðin um at vera við aftur ger eisini, at Rógvi Jacobsen vil gera alt fyri at sleppa undan einum nýggjum skaða.

– Tá tú hevur verið skaddur so leingi sum eg, situr skaðin sjálvsagt í bakhøvdinum í eina tíð. Av tí sama eri eg varin og strekki nógv út, og ansi betri eftir enn fyrr, fortelur Rógvi Jacobsen, sum kortini leggur dent, at nú hann er við, so er tað tí, at hann er 100 prosent klárur.

– Eg havi spælt fleiri dystir á tamb og eri 100 prosent frískur. Eg eri eisini komin fyri at spæla og vóni tí, at eg sleppi upp í part, staðfestir klaksvíkingurin, ið kortini ikki metir seg vera sjálvskrivaðan á liðnum.

– Vit eru 22 mans, sum kappast um at byrja inni. Eg eri komin við nú árið nærkast endanum, so eg eigi einki pláss.

### Arnbjørn hóttir

Spurdur beinleiðis, um hann kennir seg hóttan av Arnbjørn Hansen, sum skoraði í seinasta landsdysti, er svarið greitt.

– Ja, tað er eg. Sum nú er, eiga teir menninir, sum skoraðu og vunnu seinast, plássini. So má eg bara stríðast og arbeiða fyri at fáa mítt pláss aftur, sigur toppskjúttin á føroyska fótbóltslandsliðnum.

## Løtt og stutt venjing í kvøld

Brian Kerr, landsliðsvenjari, var skjótur at hála menn sínar út á franska grasið í gjárkvøldi. Eftir komu á hotellið og ein skjótan bita, varð farið beint á venjingarvøllin.

Talan var um eina lætta og stutta venjing, mest fyri at loysa upp eftir ferðina til Fraklands og fyri at leikararnir skulu kenna, at teir eru komnir í gongd. Vantandi ljósið kring vøllin gjørdi eisini, at møguleikarnir fyri at venja um kvøldið vóru rættiliga avmarkaðir.

## Góð ferð til Frakland

Ferðin til Fraklands góð. Hálvantriðja tíma tók tað at flúgva úr Vágum til Brest í Frankaríki, og frá sjálvum flogvøllinum tók tað hálvanannan tíma við bussi til Trégoier, har føroyska ferðalagið varð eskorterað av fronskum løgreglumonnum á motorsúkklu. Í býnum Trégoier, har føroyska ferðalagið heldur til og sum liggur skamt frá Guingamp, har dysturin verður spældur leygardagin, siga tey frá hampiligum veðrið næstu dagarnar. Sólglottar og sirm, meðan hitin verður umleið 15 stig.

